# kuhandil




Halla Sif Elvarsdóttir við einum parti av úrvalinum, ið kann bíleggjast á heimasíðuni

*– Meirilutin er mannfólk, teir eru raskari at keypa enn kvinnurnar. Og bíleggingarnar koma úr øllum landinum*



Hetta er ein sonevnd anal-dildo, sum kann spennast føst á gólvið ella veggin




Soleiðis sær varrastiftin út, sum í roynd og veru er ein pinkalítil duld dildo, ið eisini hevur vibrator

svar uppá.

– Men konufólk keypa ofta, tá tey eru til ymisk "parties". Mannfólk hava eingin tílík "parties", sigur Halla Sif Elvarsdóttir sum eitt boð upp á, hví fleiri mannfólk keypa frá henni enn konufólk.

## Sølutølini prógva tørvin

Eitt er tað, at fleiri mannfólk eru millum kundarnar í einasta føroyska sexleikuhandlinum. Eitt annað er, um tað yvirhøvur er tørvur á einum slíkum handli til føroyingar?

– Tað haldi eg at sølutølini prógva. Eg fái javnan fyrispurningar um vørur, ið eg ikki havi, har fólk spyrja, um tað ikki er nakað eg kann bíleggja, og tað royni eg so, greiðir Halla Sif Elvarsdóttir frá.

Í so máta líkist sexleikuhandilin øðrum handlum, og í roynd og veru er hesin fremmandi handilin í Føroyum, líkur klædnahandlum, føroyingar dagliga vitja í, á fleiri aðrar mátar við. Har er eitt ávíst úrval av vørum, men hevur hon ikki tað, kundin leitar eftir, so bíleggur hon tað til hann. Eisini leggur Halla Sif Elvarsdóttir seg alla tíðina eftir at hava eitt skiftandi og breitt úrval av vørum, soleiðis at tað er ein støðug útskifting av leikunum.

Men hóast sølutølini eru har, sum prógva at tørvur er á einum handli